# TILBOÐ - TILBOÐ - TILBOÐ

## Slaktarin

Oksafilet frá Brasilien
5-6 kg.
1/2 kg. 19⁹⁵
Prísur pr. kg. 39⁹⁰

Høsnarungar
5 x 1100 gr.
99⁹⁵

Svenskar dunnur
salmonellafríðar
2,4-2,6 kg. 119⁹⁵

## Slaktarin

New Zealandskt
fekst lambskjøt
fyri kg. 44⁹⁰

New Zealandskt
fekst lambskjøt
einans 5% feitt
1/2 kg. 24⁹⁵
Prísur pr. kg. 49⁹⁰

## Krásadeildin

Rækjusalat
200 gr. 19⁹⁵

Brot av lýsing
hjá Miklagarði
í februar 1978






## Bakarin

Jólabollar
5 fyri 20⁰⁰

Jogurt breyð
1 fyri 9⁹⁵




MIKLAGARÐUR





*Tey hava starvast í SMS øll 25 árini. Frá vinstru: Anna Marie Nyby, Mary Húsgarð, Hedvig Svensson, Hallgerð Johannesen, Oddvør Jacobsen og Kári Justinussen. Aftanfyri stendur Hans Mortensen, stjóri. Jórun Johannesen og Jørgen Jørgensen vanta á myndini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# 25 ára starvsdagar í SMS

Tað kemur fyri av og á, at tað frættist um starvfólk, sum hava starvast í einum og sama arbeiðsplássi í so og so mong ár.

Men neyvan hava vit tikið munnin ov fullan, tá vit siga, at hetta ikki er gerandiskostur. Men nú SMS fór um tey fimmogtjúgu, vóru tað ikki færri enn fýra fólk, sum samstundis høvdu 25 ára starvsdag hjá P/F SMS. Hesi vóru Mary Húsgarð, Hallgerð Johannesen og Jórun Johannesen sum allar starvast í bókhaldinum, Jørgen Jørgensen - ella Jørgen »slagter«, sum hann vanliga verður nevndur. Umframt hesi hevur Hans Mortensen sjálvsagt verið í SMS hesi árini og meir enn tað.

Meðan Mary hevur starvast í bókhaldinum øll árini, byrjaðu tær báðar, Hallgerð og Jórun, í Miklagarði, ella »Superland«, sum tað æt tá.

Eftir ein heldur strævnan jólahandil í Miklagarði í 1986, har hon m. a. pakkaði víndrúvur í ein heilan mánað, segði Hallgerð upp. Men tað slapp hon ikki uttan víðari, tí økta virksemi á skrivstovuni eftir umfatandi umbyggingina, hevði við sær, at hon varð flutt á skrivstovuna, har hon er framvegis.

Nakað eftir hetta og eftir ein lítlan starvssteðg (sum ikki verður taldur við) byrjaði Jórun eisini á skrivstovuni hjá SMS, har hon er framvegis.

Ikki nóg mikið við tí, at hesi fýra hava starvast í húsinum í samfull 25 ár, tí eisini fýra av leigarunum í SMS hava verið á Trapputrøðni síðan SMS lat upp tann 2. novembur í 1977. Hesi er Anna Marie Nyby, eigari av Vero Moda, Kári Justinussen, eigari av Grifflinum, Hedvig Svensson, sameigari av skógvahandlinum Demmus og Oddvør Jacobsen, eigari av Fríðkuni og Flykruni.

Á veitsluni á Hotel Føroyum leygarkvøldið 2. november vóru hesi áttu heiðrað.

# SMS-liðið virkar nú aftur



Ein tænasta, sum vit hava veitt viðskiftafólkið okkara á heimasíðuni, www.sms.fo, er SMS-liðið. Her hevur borið til at melda seg til eina tænastu, har vit senda sms-boð frá SMS um tilboð, tiltøk, dagsins rætt og annað út á tilmeldað fartelefonnummur.

Tíðliga í ár var limatalið vorðið rættuliga stórt, og tænastan virkaði væl. Men tá segði tøknin hjá Føroya Tele, sum sendir sms-boðini víðari, stopp.

Í stuttum kann sigast, at tað við táverandi tøkni ikki lat seg gera, at senda so mong sms-boð út í senn, sum vit gjørdu.

Síðan tá hava tey á Føroya Tele arbeitt við eini loysn, og nú – umleið seks mánaðir seinni – er tænastan tøk aftur. Og vit eru longu farin at nýta hana aftur.

Í síðstu viku sendu vit rættuliga mong boð út til limirnar á SMS-liðnum í sambandi við 25 ára føðingardag okkara, og alt gekk væl.

Ein lítil munur er á tænastuni nú í mun til áðrenn, er tann, at vit nú gjalda fyri at senda hvørt sms-boðið til limirnar. Hetta gjald er ikki fastlagt frá Føroya Tele í skrivandi stund, og um hetta verður ov stórt, verður tænastan, sum vit veita okkara viðskiftafólkum ókeypis, niðurløgd.

Tì vóna vit, at tey á Føroya Tele fara at vera lagalig við gjaldinum, soleiðis at SMS-liðið kann halda fram, og tit harvið fáa feskastu tíðindini frá SMS, send sum SMS á tykkara fartelefonir.

SMS-liðið

# Bjarni vann gávukortið á 50.000 kr

Leygardagin 2. november, tá SMS hátíðarhelt sín 25 ára dag, varð vinnarin av stóru føðingardagskappingini, sum SMS og Atlantic Airways hava skipa fyri í felag, funnin á Torginum.

Í stuttum kann sigast um sjálva kappingina, at hon hevur hevur verið í seks umførum. Í fyrstu atløgu var hon í SMS blaðnum, men tá útgávan steðgaði orsakað av stóru umbyggingini í summar og heyst, helt kappingini fram í Sosialinum. Hetta ávirkað sjálvandi kappingina nakað, men tey á marknaðardeildini í SMS eru kortini væl nøgd við undirtøkuna. Tì tá drátturin fór fram á Torginum leygardagin 2. november kl. 16:45, stóð ein stór kurv á Torginum á tremur við svarlepum.

Í sambandi við dráttin leygardagin var Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways, á Torginum, har hann avdúkaði vinnarin av stóra høvuðsvinninginum, sum var eitt gávukort á 50.000,00 frá Atlantic Airways.



*Hepni vinnarin av gávukortinum frá Atlantsflog gjørdist Bjarni Fríðberg av Argjum, og hann kann nú frítt ferðast fyri 50.000,00*

Hepni vinnarin gjørdist Bjarni Fríðberg av Argjum, og hann kann nú frítt ferðast fyri 50.000,00, bæði á rutunum hjá Atlantic Airways, og annars aðrastaðni í heiminum.

Umframt stóra høvuðsvinningin vóru 9 gávukort á 500 krónur frá handlum í SMS burturlutað. Hesar vinningarnar vunnu:

Arnhild Johansen, Havn,
Daisy Petersen, Fuglafjørður,
Guðrun Winther, Klaksvík,
Katrin Absalonsen, Søldarfjørður
Dinna G. Joensen, Runavík,
Eyðhild Lindholm, Saltnes,
Janus Dragasund, Havn, A. Mørkøre, Velbastaðvegur 6, Havn,
Birgir Sondum, Havn

Vit ynskja teimum øllum tillukku.

# Føðingardagskappingin á heimasíðuni

Í síðstu viku var ein føðingardagskapping á heimasíðuni hjá SMS, www.sms.fo, har vitjandi kundu svar trimum spurningum, og harvið verða við í lutakastinum um 10 gávukort á 200 krónur frá handlum í SMS.

Mong vitjandi vóru á síðuni og svaraðu spurningunum. Týsdagin var lutakast ímillum øll tey, sum høvdu svarað rætt upp á spurningarnar, og teir tíggju hepnu vinnararnir eru:

Tummas Juul, í Havn, gávukort frá Skálki

Durita Nielsen, Keypmannahavn, gávukort frá Mango

Elsa L. Joensen, Signabøur, gávukort frá Klivanum

Andrias Mikkelsen, Hoyvík, gávukort frá Deres

Vónbjørt Sørensen, Tórshavn, gávukort frá Bókasøluni

Julian Eysturdal, Klaksvík, gávukort frá Grifflinum

Pætur Joensen, Norðdepil, gávukort frá 3-arinum

Anbjørg Apol, Havn, gávukort frá Sportmaster

Rakul K. Lisberg, Havn, gávukort frá Demmus

Birita Heradóttir, Havn, gávukort frá Elding